HEILSANIR

Góða Bjarta
Hjartaliga tillukku við 11 ára degnum.
Ynskir lítli Alberg xxx

Góði fitti Beinir
Hjartaliga tillukku við tínum fyrsta føðingardegi.
Ynskja omma og fastir

Góði elskaði Ragnar!
Hjartaliga tillukku við 12 ára degnum. Bestu ynskir í framtíðini frá
mammu, babba, Stefan og Teitur

Eg, systir og foreldur míni vilja takka øllum, sum gleddu meg við gávu, kortum og telegrammum á konfirmatiónsdegi mínum tann 25. mars 2001.
Sára Dimon Djurhuus, Tvøroyri

Góða Paula
Hjartaliga tillukku við 11 ára degnum í dag, alt tað besta í framtíðini.
Ynskja mamma, babba og Jóhannes

Góða Paula
Hjartaliga tillukku við 11 ára degnum í dag, eisini ein heilsan til mammu við degnum sunnudagin.
Ynskja omma og abbi

Góði Beinir!
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 6. juni.
Ynskja mamma og babba

Góða dóttir og systir
Hjartaliga tillukku við 29 ára føðingardegnum í dag, skunda tær nú, alt gott í framtíðini.
Ynskja mamma, babba og beiggi

Á føstulávint er tað skemtiligt at fáa gestir í serligum búna. Góða Anita tillukku við 8 ára degnum grundlógardagin.
Heilsanin er frá okkum øllum, Rolf

Góða elskaða Mekhala!
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum 5. juni og alt gott í framtíðini.
Ynskja omma, abbi og Vár

Nú ert tú blivin ein stór genta. Hjartaliga tillukku við 7 ára degnum. Jesus signi teg.
Heilsan babba, omma og abbi

Góða Heidi
Hjartaliga tillukku við 22 ára degnum 06. juni. Alt tað besta í framtíðini.
Heilsan Hertha

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

TILTØK

Frelsunarherurin, Tórshavn
Leygardagin kl. 11 útimøti. Sunnudagin kl. 11 møti við Palla Petersen, kl. 18 møti, major Inger Sofie Tjåland talar.

Aglow
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Hóskvøldið kl. 20 verður Taizé-kvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardagin kl. 11.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Orðsinstænasta v/kommunión í Kerit. Sunnudagsskúlin verður kl. 14.

KFUM og KFUK í Havn
Hóskvøldið kl. 19.30 í KFUK: Fundur við Duritu Tausen (bert fyri limir).
Sunnudagin 24. juni kl. 14.00 skipa, um viðrar, KFUM og KFUK fyri útferð við Norðlýsinum vestur um Hestoynna. Sigið frá áðrenn 11. juni á tlf. 311928, tað er ikki neyðugt at vera limur, fyri at vera við, øll kunnu tekna seg. Havi matpakka og okkurt drekkandi við. Ferðin varar 5 tímar. Luttøkugjald 200 kr.

Filadelfia, Landavegur 22
Í annaðkvøld kl. 21 ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti við Tummas Jacobsen, kl. 18 kvøldmøti við Tummas Jacobsen, kl. 22 útimøti við Evangeliihúsinum.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Meinigheitshúsið
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti, sang- og vitnimøti. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 familjumøti við Birgit og Niels Juul Olsen.

Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

Samkoman Immanuel
Fríggjakvøldið kl. 20 Kongsins Herlið. 8 ár og eldri eru vælkomin.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Hóskvøldið kl. 20 bíbliutími við Høgna Poulsen, evni: Bøn – Paulus: 2. Tess. 1, 1-12.
Heimasíða okkara: www.koma.fo

Vestmanna Missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Niklas Mikkelsen úr Gøtu.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti.

Útimøti
Heimamissiónin hevur útimøti komandi sunnudag kl. 17.00 í Haldarsvík og kl. 19.00 í Tjørnuvík við sangbólkinum Gittit o.ø.

Filadelfia, Sundalagið
Í dag kl. 16-17.30 Urtagarðurin – eitt trivnaðarstað fyri børn, kl. 18-19 bønarmøti.

Keldan, Skálafirði
Opið hús leygarkvøldið kl. 21 við Paula Høj.
Sunnudagin kl. 17 møti og barnamøti kl. 17.
www.keldan.fo

Soli Deo Gloria
Mikumorgunin kl. 06 bøn, kl. 20 samlast tey, sum ynskja at syngja lovsang í Vágstúni á Norðoyarstevnu.
Sunnudagin ongin sunnudagsskúli, kl. 18 er møti.

Aglow, Suðuroy
Møti verður leygarkvøldið kl. 20 í høllini hjá Tvøroyrar Handverkarafelag. Øll eru vælkomin.

Betel, Vágur
Í juni og juli er bønarfundurin mánakvøld lagdur saman við uppbygg. fundinum ónskvøld.

Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin kl. 18 møti við Toril Waag Olsen.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 4. juni:
Stongt
Týsdagin 5. juni:
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Ull & Spuni.
Nýggjur filmur um føroyska siðvenju innan ull og ullarvirking
Mikudagin 6. juni:
kl. 10-12 Fyrireiking til døgurðan
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur
Hósdagin 7. juni: kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Fríggjadagin 8. juni:
kl. 10-17 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Felagið Tórshavn – gongutúrur
Sunnudagin 10. juni verður gongutúrur út á Borðuna. Farið verður av Bursatanga kl. 10.00. Havið heit og góð gonguklæði og matpakka við. Tilmelding.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundir verða í kvøld kl. 20–21.

Al-anon
fundur er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 á Vaskarínum í Tórsgøtu 5.

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304

Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin mánadag kl. 14-18 og hósdag kl. 14-20. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

KRIS í Føroyum
Ráðgevingar og viðtalu telefonin er nú opin hvørt mánakvøld og hóskvøld á tlf. 458181 frá kl. 20-22. Møguleiki er eisini fyri at skriva beinleiðis til felagið á adressu: KRIS í Føroyum, boks 345, 700 Klaksvík.

Amnesty International
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Føroyskir fiskimenn
uttanlands, tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

MBF-skrivstovan
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail:
mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373

Javni N. Finsensgøta 32
Skrivstovan er stongd vegna summarfrí. Ringjast kann til ein av nevndarlimunum.
Eirikur Dam, tlf. 422087
Jógvan Elias á Løgmansbø, tlf. 317686
Jarvin Feilberg Hansen, tlf. 320237
Malena Arnholdsdóttir, tlf. 441395
Diana í Puntabyrgi, tlf. 316510 – fax 310557
email:
punta@post.olivant.fo

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Giktafelag Føroya
MBF Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 fax 310813
e-mail:
gikt@post.olivant.fo
Opið týsdag og hósdag kl. 10-13.
Fibromyalgibólkurin:
Tlf. 310237 týsdag frá kl. 10-12.
Ungdómsumboð:
Sára, tlf. 373106. E-mail:
sara@post.olivant.fo

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivtlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

PRÓGV

Leygardagin 9. juni giftast í prestagarðinum í Vági Harriet Hjelm og Johannes Joensen, bæði úr Vági.

Leygardagin 9. juni giftast í Dåstrup kirkju Súsan Christensen og Bjarni Joensen, bæði úr Havn. Brúdleypsadr.: Assendløsevejen 16, DK-4130 Viby, Sjælland.

Leygardagin 30. juni kl. 15.00 giftast Benadikta Sofía Kruse og Sven Bergur Jensen í Adventistakirkjuni í Tórshavn. Vælkomst verður í Niels Finsensgøtu 32, frá kl. 21.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við luttøku, vinarliga gevið boð áðrenn 12. juni á tlf. 0045 38113519.